# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Varaforsetin og fjølmiðlarnir

TAAC ráðstevnan var fakliga og innihaldsliga ein succes, og fokus varð sett á nógv týdningarmikil evni. Hóast alt sostatt gekk fakliga væl, so hava nøkur misljóð verið, ið vit ikki uttan víðari kunnu lata fara aftur við borðinum. Vit hugsa um handfaringina av vitjan Al Gores við atliti at fjølmiðlunum. Tað er alkunnugt, at innlendskir so væl sum útlendskir fjølmiðlar eru vónsviknir av, at tíðindafólkið so at siga als ikki fekk orð á varaforsetan og umhvørviskempuna. Vit vístu á í oddagrein mánadagin, at júst vitjanin av Gore fór a virka fremjandi og framflytandi fyri Føroyar og serstakliga føroyska gransking úti í heimi. Hetta at nýta ein navnframan gest til at fremja framflutning ella tað, sum á fremmandmáli verður nevnt promovering, er heilt vanligt í øðrum londum. Hetta var sjálvsagt eisini ein av orsøkunum til vitjanina hjá fyrrverandi forsetanum Bill Clinton. At seta Føroyar á heimskortið, og tað skuldu ikki minst útlendsku tíðindafólkini rudda slóð fyri. Staðfestast kann uttan víðari, at líka so væl, sum Clinton vitjanin eydnaðist í tíðindahøpi, líka so vánlig var Gore vitjanin í hesum høpi.

Føroysk tíðindafólk eru vónsvikin, almenningurin er vónsvikin og tað, sum verri er: tey útlendsku tíðindafólkini eru vónsvikin. Vitjanin hjá Gore setti hvørki Føroyar ella TACC á heimskortið í tann mun hetta kundi verið gjørt, um hesin partur av vitjanini hevði riggað. Fjølmiðlafólk mugu spyrja, hví Gore var so styggur í mun til pressu og almenning? Vit mugu eisini spyrja, hví Gore var í Tinganesi, meðan okkara navnframi vísindamaður Bogi Hansen hevði sína sera týdningarmiklu framløgu. Bogi Hansen, professari, er heimsgitin fyri sína gransking av havstreymum og týdningi teirra fyri veðurlagið. Al Gore, fyrrverandi amerikanskur varaforseti og Føroya løgmaður áttu sjálvsagt at sitið í fremstu røð í Norðurlandahúsinum, meðan Bogi hevði sína framløgu. Framløgan, føroyski vísindamaðurin og Føroyar høvdu tá verið høvuðssøgan í útlendskum fjølmiðlum. Vit mistu her eitt einastandandi høvi at seta Føroyar og føroyska gransking á heimskortið júst hendan dagin. Illa fyriskipað! Ella hvør var orsøkin? Tað hjálpir ikki at skylda uppá Gore. Vitjan Gores í Íslandi dagin eftir vísti, at honum dámar væl fjølmiðlar og at stíga fram. Eftir stendur spurningurin: Var hetta mál nóg professionelt handfarið av fyrireikarunum? Tann, sum bjóðar slíkum gesti, fær vanliga júst tað, hann ynskir og rindar fyri. Nógv bendir á, at vertirnir hava ikki tryggjað sær, at fjølmiðlaparturin av vitjan Gores var í lagi. Hetta er bæði synd og skomm, og útlendsku fjølmiðlafólkini, sum nú so nakkalong eru farin heimaftur, kunnu staðfesta, at vertirnir fyri eina annars fakliga framúrskarandi ráðstevnu megnaðu ikki í nóg stóran mun at brúka Al Gore, ið hevði størstu altjóða atdráttarmegina, til at seta Føroyar á heimskortið. Tað var jú m.a. tí hann varð boðin at vitja okkara vøkru oyggjar – at seta fokus á veðurlagið og á Føroyar.

**Sosialurin**

## Bogi greiðan boðskap?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Lurtaði eftir tíðindunum í morgum 7. apríl.

Í samband við vitjanina hjá Al Gore verður nógv gjørt burtur úr spurninginum um menniskjans ringu viðferð av náttúruni.

Hetta verður í mestan mun orðað sum okkara dálking av náttúruni við at oyðsla við oljuorku v. m. Úrslitið er sonevnt oyðing av pørtum av ozonlagum við hartil ógagnligari upphitan av jørðini.

Útvarpskvinnan segði, at Bogi hevði ein greiðan boðskap um hesi viðurskifti. Í stuttari endurgávu av orðum hansara varð sagt, at "vit kunnu vænta heitari veðurlag, ið kundi gagna okkum á landi og sjógvi, men vit kundu eisini rokna við kaldari veðurlag, og tá varð ikki livandi her"!

Tá tíðindastubbin var liðugur, sat eg eftir við spurninginum: Hvør var hansara "greiði boðskapur"?

Eg ivist ikki í, at Bogi við sínum kanningararbeiði hevur ásannað vandan á gagnligar fyritreytir fyri lívi í náttúruni, í hesum føri í sjónum.

Niðurstøðan hjá øllum okkara vitandi og vælløntu granskarum er, at vit mugu minka orkunýtsluna, fyri at bøta um skaðan.

Men tað er rættuliga áhugavert at fylgja við, hjá hvørjum ovurnýtslan skal minka. Grundarlagið undir mesta partinum av "góðu" lønini hjá okkara lærdu stavar júst frá oyðsli á beinleiðis og óbeinleiðis orkunýtslu og oyðing av náttúrutilfeinginum.

Hetta er als ikki vent ímóti persóninum Boga, men eg ásanni, at í gerandisdegnum er einki meðvit hjá høvuðsaktørunum, men alla tíðina verður bara kravt meira!

Sjálvur livi eg av lágu lønini, sum arbeiðsmannafeløgini klára at skaffa, so er oljan ov dýr, mást tú ansa eftir at skrúva fyri óneyðuga heitum ovnum, ella í øðrum føri sita kaldur.

Eg rokni við, at vælønt fólk sum Bogi í hesum føri krevja meiri løn! Og azonlagið líður víðari - inntil næstu ráðstevnu!

Tað er einki stríð um brot á lønarsáttmálar, tá ferðin hjá vinnuni má setast niður, og inntøkan minkar. Bert færri arbeiðsdagar. Orkunýtslan má setast niður. Har er einki sáttmálabrot. Men hvat hendir, um lønarinntøkan hjá fastløntum/vælbjargaðum av somu orsøk skal lække? Verkfall!

Er ongin meining í hesum? Tíverri JÚ!

## Fuglaveiða

SÍMUN MITTÚN

smittun@email.fo

Vit, sum minnast aftur í sekstiárini og kanska eisini í fimmtiárini, vilja minnast, at um tú ynskti eitt kók ella tvey av tí vælsmakkandi álku ella lomvigu, so var bert at fara ein túr út á fjørðin, har var bæði á vári og á heysti nokk av svartfugli, og fuglabjørgini vóru á tremur av fugli.

Tíverri hendi okkurt fyri ikki so langari tíð síðan. Fuglurin fór at minka, og nú er stórt sæð eingin svartfuglur eftir í teimum flestu bjørgunum.

Tað fyrsta eg minnist, tað vil siga í fimmtiárunum, var næstan eingin almenn regulering, men tá fuglurin fór at minka, kom Løgtingið uppí, og tann seinasta lóg um fuglaveiðu sigur, at bert er loyvt at veiða lunda, lomvigu og álku frá 1. oktober til 20. januar.

Hetta er sjálvandi gott og neyðugt, men eg haldi, at vit áttu at farið longur og bannað allari veiðu, í øllum førum av álku og lomvigu, tí, tað sum verður skotið í nevnda tíðarskeið, er ikki fuglur úr føroyskum bjørgum, onkur sigur, at hann kemur úr Íslandi, onnur siga Hetlandi, men tað kunnu fuglafrøðingar siga nærri um.

Eg haldi bara, at tað ikki kann vera rætt, at vit - uttan fyrilit - skjóta í túsundavís av hesum gestafuglum, og eg rokni eisini við, at tá okkara grannar varnast, hvussu umfatandi henda veiða er, fer tað at skapa okkum trupulleikar.

Eg fari tí at heita á Løgtingið at handla, áðrenn grannarnir gera tað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.